TAKS

# Væntanir og eftirkanningar hjá TAKS av fíggjarstovnum í sambandi við CRS-standardin

## Væntanir og eftirkanningar hjá TAKS av fíggjarstovnum í sambandi við CRS-standardin

CRS, ensk stytting Common Reporting Standard, er standardur hjá OECD til fíggjarstovnar at ganga eftir í mun til eyðmerking og fráboðan av fíggjarkontum, sum hava tilknýti til útheimin.

Hetta skjal lýsir, hvat TAKS væntar av fíggjarstovnum í Føroyum í mun til CRS-standardin, og hvussu TAKS eftirkannar, at gjørt verður sambært væntanunum.

Skjalið er ætlað at nýta hjá TAKS, fíggjarstovnum og veitarum hjá fíggjarstovnum, og tað skal lesast í samsvari við CRS-standardin, CRS-viðmerkingarnar, CRS-spurningarnar og CRS-kunngerðina.

### At leggja sær í geyma um heitið fíggjarstovn

Heitið fíggjarstovnur, ofta eisini fíggjarligur stovnur, verður nógv brúkt í CRS. Týdningarmikið er at vita, at í CRS-høpi fevnir hetta heiti ikki bara um størri og etableraðar eindir sum bankar og tílíkt, men eisini um vanlig feløg, stór og smá, bert høvuðsendamál teirra er at gera íløgur. Við fíggjarligan stovn ella fíggjarstovn meinast í hesum teksti eisini við hesi feløg. Gev harumframt gætur, at í CRS verður eisini sagt fráboðandi fíggjarligir stovnar. Fyri lættleikan skyld siga vit bara fíggjarstovnar.

### Onnur grundleggjandi hugtøk í CRS

- CRS-standardur: Enskmælti CRS-standardurin, t.e. Common Reporting Standard. Síggj hann á www.oecd.org.
- CRS-viðmerkingar: Enskmæltu viðmerkingarnar til CRS-standardin, t.e. Commentaries on the Common Reporting Standard. Síggj tær á www.oecd.org.
- CRS-spurningar: Enskmæltu FAQ-spurningarnir um CRS-standardin, t.e. CRS-related Frequently Asked Questions. Síggj teir á www.oecd.org.
- CRS-kunngerð: Kunngerð nr. 11 frá 19. februar 2016 um eyðmerking og fráboðan av fíggjarkontum við tilknýti til útheimin. Síggj hana á www.logir.fo.

Onnur hugtøk í sambandi við CRS eru lýst í 1. kapitli í CRS-kunngerðini.

## Bakgrund og meginreglur

Sambært § 120 q í skattalógini kann landsstýrismaðurin við kunngerð áseta reglur um, at fíggjarstovnar árliga, uttan at biðið verður um tað, skulu lata TAKS upplýsingar um fíggjarkontur, sum hava tilknýti til umheimin. Hetta hevur landsstýrismaðurin gjørt við CRS-kunngerðini.

Sambært kunngerðini skulu fíggjarstovnar í Føroyum skráseta seg hjá TAKS við skyldu til at lata TAKS álagdar CRS-upplýsingar. Fíggjarstovnarnir skulu fylgja teimum ásetingum, sum kunngerðin hevur um hóskandi umhugsni við fíggjarkontum, og teir skulu árliga lata TAKS upplýsingar um

fíggjarkontur, sum hava tilknýti til útheimin. Hevur fíggjarstovnur ongar slíkar kontur, men tó fráboðanarskyldu, skal hann lata TAKS eina nullrapport í staðin. Tað skal hann sambært § 102, stk. 2, í CRS-kunngerðini.

Fíggjarstovnar skulu fylgja mannagongdunum, sum CRS-kunngerðin ásetir, og teir skulu lata TAKS kravdar upplýsingar innan fyri tær freistir, sum standa í kunngerðini. Kontur skulu viðgerast í samsvari við bæði CRS-standardin, CRS-kunngerðina, CRS-viðmerkingarnar og CRS-spurningarnar. Upplýsingar, ið fíggjarstovnar lata TAKS, skulu vera rættar og samsvara við dáturnar, haðan upplýsingarnar stava.

Fíggjarstovnar skulu seta í verk mannagongdir og tiltøk, sum tryggja, at teir altíð lúka treytirnar í CRS-kunngerðini. Mannagongdir og tiltøk skulu standa mát við virksemið hjá fíggjarstovnunum.

TAKS tulkar CRS-kunngerðina í samsvari við CRS-standardin og CRS-viðmerkingarnar. Tað ger TAKS sambært § 108 c í kunngerðini.

TAKS eftirkannar, um fíggjarstovnar halda CRS-kunngerðina. Kannað verða eitt nú viðurskifti, sum nevnd eru í partinum “Hugtakið innanhýsis kontroll”. TAKS fer at samstarva við fíggjarstovnar, ið eru sinnaðir at lúka treytirnar í CRS-kunngerðini. Aðramáta verða teir revsaðir sambært § 139 c, nr. 3, í skattalógini og § 108 b í CRS-kunngerðini.

## Væntanir hjá TAKS

TAKS væntar, at fíggjarstovnar í mun til CRS-standardin hava eina skipaða tilgongd til fráboðan, eftirlit, yvirlit, innanhýsis kontroll og annað.

Fíggjarstovnar skulu føra yvirlit yvir stig, sum tikin eru til at halda ásetingarnar í CRS-kunngerðini. Teir skulu eisini føra yvirlit yvir upplýsingar, sum innsavnaðar eru fyri at kunna eyðmerkja viðurskifti, ið nevnd eru í ásetingunum um hóskandi umhugsni. Yvirlitini skulu goymast í minst fimm ár. Tað skulu tey sambært § 60 a, stk. 2 í CRS-kunngerðini.

Ein fíggjarstovnur kann biðja óheftan grannskoðara kanna, um fíggjarstovnurin lýkur treytirnar í CRS-kunngerðini. Kanningin eigur at fevna um innanhýsis kontroll, eftirlit og stakroyndir av kontum hjá fíggjarstovninum. Við óheftan grannskoðara er at skilja grannskoðara, sum ikki ger annað arbeiði fyri fíggjarstovnin.

Innanhýsis kontroll, eftirlit, yvirlit yvir tikin stig og grannskoðarakanning skulu skipast soleiðis, at lætt er hjá TAKS at síggja, hvussu væl fíggjarstovnurin lýkur treytirnar í CRS-kunngerðini. Harnæst eiga fíggjarstovnar at fylgja tilmælum og boðum frá óheftum grannskoðarum og at rætta manglar uttan óneyðugt drál. Tað er greið meginregla, at tilmæli og boð frá TAKS skulu fylgjast.

Fíggjarstovnar skulu altíð tryggja, at rættingar í mannagongdum verða settar í verk, og teir skulu ikki sleppa arbeiðinum, fyrr enn komið er á mál.

Gev gætur, at hóast fíggjarstovnar nýta uttanhýsis veitarar fyri at tryggja, at treytirnar fyri hóskandi umhugsni í kunngerðini verða hildnar, so verða skyldur sambært CRS-kunngerðini verandi ábyrgd hjá fíggjarstovnunum. Hetta er sambært í § 59, stk. 2 í kunngerðini.

Fíggjarstovnar skulu tí taka stig til at fáa vissu fyri, at veitarar til eina og hvørja tíð lúka treytirnar í CRS-kunngerðini. Stigini eiga at fevna um yvirlit yvir og ræði á tænastuni, eftirlit við tænastuni, og at skjalprógv og upplýsingar altíð eru atkomulig.

Les meira um hesi viðurskifti í sektión VIII, 160-162, í CRS-viðmerkingunum, eitt nú um kravið, at fíggjarstovnar skulu altíð hava lætta atgongd til upplýsingar, sum verða goymdar hjá veitara.

## Hugtakið innanhýsis kontroll

Tað innanhýsis kontroll, sum TAKS væntar, at fíggjarstovnar hava, skal tryggja, at teir altíð lúka treytirnar í CRS-kunngerðini, og skal standa mát við virksemið hjá stovnunum, eitt nú stødd, innihald, kundar, tænastuveitingar o.s.fr. Kontroll kann gerast partur av heildarætlanum hjá fíggjarstovnum, serliga í mun til váðastýring.

Væntað verður, at innanhýsis kontroll fevnir um eind, mannagongdir og fráboðanir.

### Innanhýsis kontroll við eind

*Gev gætur, at verður í komandi talvum víst til rættarreglu, og hon ikki verður nevndur við navni, so er talan um CRS-kunngerðina.*

| **Øki** | **Ynskilig úrslit** |
|---|---|
| Umhvørvi | Umhvørvið í fíggjarstovninum stuðlar uppundir, at hann heldur CRS-skyldur sínar, millum annað í mun til struktur, hugburð, viðurkenning og gerðir. Leiðslan tryggjar eitt greitt býti av leiklutum og ábyrgdum innanhýsis, og hon hevur umsjón við tí, sum ávirkar CRS. Váðastýringin er skipað og hevur fyrilit fyri munandi broytingum í virkseminum, og mannagongdir tryggja, at viðkomandi starvsfólk kenna skyldurnar hjá fíggjarstovninum í mun til CRS. |
| Virksemi | Fíggjarstovnurin eyðmerkir og handfer váðar skilagott, serliga við atliti at fyribyrging og rætting. Mannagongdir tryggja, 1) at váðar verða viðgjørdir uttan óneyðugt drál, 2) at fíggjarstovnurin hevur atgongd til |

| | |
|---|---|
| | allar neyðugar upplýsingar og øll neyðug skjalprógv hjá veitarum, 3) at fíggjarstovnurin hevur yvirlit yvir og ræði á veittum tænastum, 4) at allar kontur verða viðgjørdar í samsvari við CRS, herímillum kontur við stórum váða, eitt nú ikki-skjalprógvaðar kontur, óvirknar kontur og kontur, sum eru undantiknar, og 5) at aggregering av upphæddum og umrokning av gjaldoyra í sambandi við fráboðan fara fram sbrt. §§ 98-101 í CRS-kunngerðini. Fíggjarstovnurin setir hartil í verk tiltøk, ið tryggja, at frávik verða fyribyrgd og eyðmerkt. Sí § 108 í kunngerðini um hetta. |
| Skipanir | Fíggjarstovnurin tryggjar CRS-upplýsingar við hóskandi KT-skipanum. Mannagongdir veita vissu fyri, at CRS-upplýsingar eru rættar og fullkomnar frá byrjan til enda, herímillum í mun til stovnan av kontu, hóskandi umhugsni og fráboðan. Fíggjarstovnurin skjalprógvar eisini stig, sum tikin eru til at lúka ásetingarnar um hóskandi umhugsni, og hann goymir hesi skjalprógv. Sí § 60 a í CRS-kunngerðini. Skjalprógv og goymsla eru soleiðis skipað, at TAKS lættliga kann gera eftirkanning. |
| Broytingartilgongd | Fíggjarstovnurin er fyrireikaður til broytingar, komi tær innanífrá ella uttanífrá, og hann lýkur støðugt CRS-skyldur sínar. Hetta merkir millum annað, at fíggjarstovnurin hevur mannagongdir, sum tryggja, 1) at hann hevur kontroll við innanhýsis og uttanhýsis broytingum, herímillum í mun til virksemi, kundar, leiklutir hjá starvsfólkum og broytingar í strukturi, og 2) at hann fylgir við í broytingum í CRS-standardinum, CRS-kunngerðini, CRS-viðmerkingunum og í útgreinandi notum og svarum frá OECD, herímillum CRS-spurningunum á heimasíðuni hjá OECD. |
| Kunning/upplýsing | Viðkomandi starvsfólk á fíggjarstovninum hava neyðuga vitan og neyðug tól til at savna inn CRS-upplýsingar rætt og til at føra yvirlit yvir stig, sum tikin eru til at lúka treytirnar í CRS-kunngerðini, herímillum ásetingarnar um hóskandi umhugsni. Hetta merkir millum annað, at fíggjarstovnurin hevur mannagongdir, ið tryggja, at upplýsingar, sum hava týdning fyri CRS, verða latnar víðari til viðkomandi starvsfólk uttan óneyðugt drál. Tað merkir eisini, at yvirlit yvir tikin stig og onnur skjalprógv verða goymd í minst fimm ár, soleiðis sum fyriskrivað er í § 60 a í CRS-kunngerðini. |
| Eftirlit/eftirmeting | Mannagongdir eru, sum tryggja, at fíggjarstovnurin lýkur treytirnar í CRS-kunngerðini. Fíggjarstovnurin hevur eftirlit við og vurderar |

| | |
|---|---|
| | mannagongdirnar fyri at tryggja, at tær eru dagførdar og virka eftir ætlan. Hetta merkir millum annað, at fíggjarstovnurin hevur mannagongdir til regluliga at meta um CRS-politikkir, mannagongdir og kontroll. Váðar, sum eru serliga umfatandi, ella sum av einhvørji orsøk ikki eru loystir innan hóskandi tíð, verða tiknir fram, skjalprógvaðir, vurderaðir og loystir eftir fastari mannagongd. |

## Innanhýsis kontroll við mannagongdum

| **Øki** | **Ynskilig úrslit** |
|---|---|
| **Nýggjar kontur** | |
| Eyðmerking og viðgerð av nýggjum kontum | Nýggjar kontur sbrt. § 31, stk. 2 og 6, í CRS-kunngerðini verða defineraðar, eyðmerktar, skjalprógvaðar og viðgjørdar sambært kunngerðini. Mannagongdir tryggja hetta. |
| Innsavnan av upplýsingum um kontueigara | Fullkomnar og rættar CRS-upplýsingar verða innsavnaðar rættstundis, tá ið konta verður stovnað. Hetta merkir millum annað, at oyðubløð til eginváttan verða gjørd soleiðis, at vissa er fyri, at neyðugar upplýsingar verða innsavnaðar. Hartil tryggja mannagongdir, at eginváttan, sum lýkur treytirnar í CRS-standardinum, altíð verður innsavnað fyri nýggjar kontur, og at upplýsingar um persónar við ræði sbrt. § 44 í CRS-kunngerðini verða innsavnaðar, tá ið tað er viðkomandi fyri nýggjar eindarkontur sbrt. § 93. |
| Eftirkanning av stovningarskjølum | Eftirkanningar av kontueigarum og persónum við ræði eru grundaðar á hóskandi skjalprógv og í samsvari við CRS. Hetta merkir eitt nú, at mannagongdir eru, sum tryggja, at rímiligheitin av eginváttanum verður eftirkannað. Les meira um hesi viðurskifti í sektión IV, 22, í CRS-viðmerkingunum. Tað merkir eisini, at eftirkanningin fevnir um allar upplýsingar, sum útvegaðar eru í sambandi við stovnanina av kontuni, herímillum upplýsingar, sum útvegaðar eru eftir AML/KYC-mannagongdum. |
| Stovnan av kontu | Einans kontur, sum lúka treytirnar í CRS-standardinum, verða stovnaðar, og mannagongdir eru, sum tryggja tað. |

| **Kontur, sum longu er til** | |
|---|---|
| Eyðmerking av kontum, sum longu eru til | Kontur, sum longu eru til, verða defineraðar og skjalprógvaðar í samsvari við CRS-kunngerðini. Hetta merkir, at mannagongdir eru, sum tryggja, 1) at fíggjarstovnurin eyðmerkir kontur, sum longu er til sbrt. § 29, herímillum hvørjar kontur eru hávirðiskontur, og hvørjar eru lágvirðiskontur, og skjalprógvar tær, 2) at fíggjarstovnurin eyðmerkir og skjalprógvar kontur, sum ikki skulu eftirkannast sambært CRS-kunngerðini, og 3) at fíggjarstovnurin kannar eftir og váttar, at treytirnar fyri at viðgera nýggjar kontur sum kontur, ið longu eru til, eru til staðar, sbrt. § 29, stk. 1, nr. 2 í kunngerðini. |
| Sjálvboðin nýtsla av ásetingum um hóskandi umhugsni í sambandi við kontur, sum longu eru til | Fíggjarstovnurin nýtir sjálvboðin alternativar mannagongdir fyri hóskandi umhugsni viðvíkjandi kontum, ið longu eru til, sbrt. § 59. T.e., at hann skjalprógvar, at hann hevur valt at viðgera kontu, sum longu er til, sum nýggja kontu, ella at hann hevur valt at viðgera lágvirðiskontu sum hávirðiskontu. |
| Mannagongdir fyri eftirkanning | Mannagongdir eru fyri eftirkanna kontur, sum longu eru til, og tær eru í samsvari við ásetingarnar um hóskandi umhugsni í CRS-kunngerðini. Hetta merkir eitt nú, at fíggjarstovnurin tryggjar, 1) at serligar mannagongdir eru fyri serlig sløg av kontum, 2) at bústaðartestin einans verður nýtt, um treytirnar fyri tí eru loknar sbrt. § 62 í kunngerðini, 3) at elektroniskt leitbarar dátur verða kannaðar, tá tær skulu kannast, sbrt. §§ 63 og 68, 4) at leitað verður í pappírsgoymslum, tá ið leitast skal í teimum, sbrt. §§ 66, stk. 1, og 69, stk. 2, og 5) at kundaábyrgdarin verður spurdur, tá ið hann skal spyrjast, sbrt. §§ 71, 76 og 100. Hartil skal fíggjarstovnurin tryggja, at persónar við ræði altíð verða eyðmerktir fyri eindarkontur, sum longu eru til, tá ið talan er um passivt NFE, sbrt. § 87, ella tá ið eind skal viðgerast sum passivt NFE, av tí at fíggjarstovnurin ikki hevur ella ikki kann staðfesta støðuna hjá eindini. Les meira um hesi viðurskifti í sektión V, 20, í CRS-viðmerkingunum. |
| Eyðmerking og viðgerð av kontum, sum ikki eru skjalprógvaðar | Fíggjarstovnurin eyðmerkir kontur, ið ikki eru skjalprógvaðar, og hann viðger tær í samsvari við CRS-standardin, sí §§ 66, stk. 2, 72, stk. 3, og 74 í CRS-kunngerðini. Tað merkir millum annað, at fíggjarstovnurin hevur mannagongdir, sum tryggja, at ikki-skjalprógvaðar kontur verða |

| | |
|---|---|
| | eyðmerktar, og at hetta verður eftirkannað, um neyðugt, eitt nú um talan er um ikki-skjalprógvaða hávirðiskontu. |
| **Leypandi eftirlit** | |
| Eftirlit við kontuupplýsingum | Broytingar í umstøðunum, herímillum broytingar í upplýsingum um kontu ella kontueigara, eru defineraðar í samsvari við CRS-standardin og eyðmerktar. Hetta merkir eitt nú, at fíggjarstovnurin tryggjar, 1) at hugtakið "broyting í umstøðunum" verður skilt rætt, sí § 60 og sektión III, 17, í CRS-viðmerkingunum, 2) at leypandi eftirlit er við møguligum broytingum í umstøðunum, 3) at broytingar í umstøðunum verða skrásettar, og at fíggjarstovnurin tryggjar, at tað verður gjørt, 4) at fíggjarstovnurin fylgir ásetingunum um hóskandi umhugsni fyri hávirðiskontur, tá ið lágvirðiskonta gerst hávirðiskonta, og 5) at fíggjarstovnurin eftirkannar upplýsingar, um hann hevur orsøk til at hugsa, at upplýsingarnar eru skeivar ella óálítandi. |
| Skjalprógv og uppfylging í sambandi við broytingar í umstøðum og aðrar broytingar | Fíggjarstovnurin sporar, skjalprógvar og eftirkannar broytingar í umstøðunum sbrt. § 60 í CRS-kunngerðini. Hetta merkir millum annað, at fíggjarstovnurin hevur mannagongdir, ið tryggja, 1) at broytingar í umstøðunum verða sporaðar, handfarnar á hóskandi hátt og skjalfestar, 2) at upplýsingar um broytingar í umstøðunum verða latnar víðari til viðkomandi starvsfólk stundisliga, 3) at fíggjarstovnurin tekur samskifti upp, viðger kontu rætt og savnar inn skjalprógv rættstundis, tá ið broyting er í umstøðunum, og 4) at fíggjarstovnurin rættstundis útvegar eina eginváttan ella nýtt próvskjal, um broyting hevur verið í umstøðunum, eftir at fíggjarstovnurin hevur nýtt bústaðartest fyri lágvirðiskontu sbrt. § 60, stk. 2. Fær fíggjarstovnurin ikki útvegað eginváttan ella nýtt próvskjal sambært 4, so hevur hann mannagongd, sum tryggjar, at leiting verður gjørd í elektroniskum dátugrunnum sbrt. § 60, stk. 3. Fíggjarstovnurin hevur hartil mannagongdir, sum tryggja, at kundaábyrgdari eyðmerkir allar broytingar í umstøðunum við atliti at einari kontu, sbrt. § 76 í CRS-kunngerðini. |
| Eftirkanning av kontum, sum ikki eru skjalprógvaðar, ikki | Fíggjarstovnurin eftirkannar regluliga kontur, sum ikki eru skjalprógvaðar, ikki verða nýttar ella eru undantiknar. Hetta merkir eitt nú, at hann hevur mannagongdir, ið tryggja, at ikki-skjalprógvaðar hávirðiskontur verða eftirkannaðar árliga sambært § 74 í CRS-kunngerðini, og at fíggjarstovnurin regluliga eftirkannar ikki-skjalprógvaðar kontur, |

| | |
|---|---|
| verða nýttar ella eru undantiknar | kontur, sum ikki verða nýttar, og undantiknar kontur, sbrt. §§ 32-39, fyri at staðfesta, um eyðmerkingin framvegis er røtt. |
| **Stongdar kontur** | |
| Eyðmerking av stongdum kontum | Stongdar kontur verða eyðmerktar og viðgjørdar í samsvari við CRS. Mannagongdir eru, sum tryggja hetta. |
| Endalig avgreiðsla av stongdum kontum | Kontur verða eftirkannaðar, áðrenn tær verða stongdar. Mannagongdir tryggja, at kontur, ið ikki verða nýttar, ikki verða stongdar eftir umbøn frá kontueigara, áðrenn fíggjarstovnurin hevur eftirkannað tær. Sí meira um hetta í sektión III, 9, í CRS-viðmerkingun-um. Mannagongdir tryggja, at fíggjarstovnurin fremur eftirkanningina og savnar inn allar neyðugar upplýsingar. |
| Skráseting av stongdum kontum | Tá ið konta verður stongd, verður tað skrásett rætt og rættstundis. Mannagongdir tryggja, at hetta verður gjørt uttan óneyðugt drál, so at viðkomandi upplýsingar verða fráboðaðar til TAKS. |

## Innanhýsis kontroll við fráboðanum

| **Øki** | **Ynskilig úrslit** |
|---|---|
| Úrdráttur av CRS-upplýsingum og fyrireiking av fráboðanum | Fíggjarstovnurin dregur út úr skipanum rættar og fullkomnar CRS-upplýsingar og fyrireikar tær til fráboðan eftir record-layout, ið fæst frá TAKS, og annars eftir CRS XML Schema User Guide. Fíggjarstovnurin hevur mannagongdir, ið veita vissu fyri, at hann dregur út dátur rætt og rættstundis, so at upplýsingarnar samsvara við kelduupplýsingarnar, og at upplýsingarnar verða eftirkannaðar, áðrenn tær verða latnar TAKS. Mannagongdir tryggja eisini, at formatið er rætt sambært record-layout og CRS XML Schema User Guide. |
| Innlating av fráboðanum | Fíggjarstovnurin eftirkannar upplýsingar og letur inn fráboðan til TAKS rættstundis, t.e. í seinasta lagi 1. mai eftir tað álmanakkaár, sum fráboðanin viðvíkir. Mannagongdir tryggja, at farið verður ikki um freistina, at upplýsingar verða kannaðar og váttaðar, áðrenn fráboðað |

| | |
|---|---|
| | verður, og at nullrapportir verða innsendar, um ongar CRS-upplýsingar eru at fráboða. Les meira um hesi viðurskifti í § 102 í CRS-kunngerðini. |
| Handfaring av feilum og broytingum | Feilir/manglar verða tiknir upp og rættingar latnar TAKS uttan óneyðugt drál. Hetta merkir, at fíggjarstovnurin hevur mannagongdir, ið tryggja, at hann fylgir við og rættar feilir, kannar teir og orsøkirnar til teirra, so at teir ikki endurtaka seg. Fíggjarstovnurin hevur hartil mannagongdir, sum tryggja, at hann uttan óneyðugt drál letur inn dagførdar/rættar upplýsingar, um givin fráboðan innihelt skeivar upplýsingar. |

## Eftirkanningar hjá TAKS

Frá 2021 at rokna hevur TAKS gjørt CRS-eftirkanningar av føroyskum fíggjarstovnum. Kanningarnar verða gjørdar fyri at meta um, hvussu væl fíggjarstovnarnir lúka treytirnar í CRS-kunngerðini.

Ein eftirkanning kann millum annað fevna um at seta spurningar, heinta inn skjøl/skjalprógv og samanbera upplýsingar/fráboðanir. Heldur TAKS orsøk vera til tess, fer TAKS at lata fíggjarstovnum tilmæli, ið kunnu vera grundað á minstukrøvini í CRS-kunngerðini.

TAKS væntar, at fíggjarstovnar taka tilmælir til eftirtektar og gera broytingar samsvarandi.

### TAKS eftirkannar fíggjarstovnar út frá eini meting av CRS-váða teirra

Fleiri faktorar verða havdir við í metingini, til dømis 1) slag og stødd á virksemi, 2) tilknýti til samtøk, 3) geografisk staðseting, 4) um fíggjarstovnurin letur inn CRS-fráboðanir rættstundis, 5) góðska á innlatnum CRS-upplýsingum, 6) í hvønn mun, fíggjarstovnurin lýkur krøvini í skattalóggávuni annars, og 7) feedback frá útlendskum skattamyndugleikum.

TAKS hyggur eisini eftir, um talið á kontum, ið fíggjarstovnar árliga fráboða, minkar ella veksur.

### Tá ið fíggjarstovnur verður eftirkannaður

Tá ið TAKS eftirkannar fíggjarstovn, fær hann áheitan frá TAKS um at svara ávísum spurningum, ið skulu geva yvirlit yvir, hvussu væl hann kennir skyldur sínar sambært CRS-kunngerðini. TAKS kann í hesum høpi biðja um skjalprógv, herímillum avrit av skrivligum mannagongdum og próvskjølum.

TAKS hevur sambært § 120 í skattalógini heimild til at krevja inn upplýsingar, ið kunnu vera TAKS til leiðbeiningar. Fíggjarstovnar hava sostatt skyldu til at veita TAKS upplýsingar, tá ið TAKS biður um

tær. Fíggjarstovnar, sum við vilja ella av grovum ósketni ikki veita TAKS umbidnar upplýsingar, kunnu revsast við sekt sambært § 141, stk. 1, nr. 3, í skattalógini.

### Tilmæli

Heldur TAKS orsøk vera til tess, kann TAKS gera tilmæli til fíggjarstovn. Hetta verður gjørt, um prógv ella ábendingar eru um, at fíggjarstovnur ikki lýkur treytirnar í CRS-kunngerðini og CRS-viðmerkingunum, antin heilt ella lutvíst. Tá kann hóskandi freist setast fyri, nær ið viðurskiftini skulu vera komin í rættlag. TAKS kann eftirkanna, um latin tilmæli verða fylgd.

TAKS væntar, at fíggjarstovnar taka tilmæli til eftirtektar og gera broytingar samsvarandi og uttan óneyðugt drál. Lýkur fíggjarstovnur ikki skyldur sínar sambært CRS-kunngerðini, og vil hann ikki taka stig til at lúka tær, fer TAKS at geva ávaring ella at áleggja revsing.

## Samband

TAKS
Smyrilsvegur 20
Postboks 2151
110 Tórshavn
taks@taks.fo
tel. 35 26 00